LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Tórshavn, tann: 7. juni 2024
J. nr.: 24/13179-9
Viðgjørt: EA

## Kunning um kommunuvalið 12. november 2024

Sambært § 2, stk. 3 í kommunuvallógini verður kommunuval týsdagin 12. november 2024.

Viðvíkjandi brævatkvøðu til kommunuval er ásett í § 14 í kommunuvallógini: "*tó kunnu sjófólk, sjúk og aðrir persónar, ið hava ikki møguleika at greiða atkvøðu á valstaðnum sjálvan valdagin, greiða atkvøðu eftir somu reglum, sum galdandi eru fyri val til Føroya løgtings við innsending av brævatkvøðum.*"

Í § 37, stk. 1 í løgtingsvallógini er ásett: "*Sjófólk og onnur, sum ikki halda seg verða heima valdagin, og veljarar, sum eru staddir uttanlanda, kunnu útfylla atkvøðuseðilin í fyrsta lagi 4 mánaðar áðrenn valdagin. Í øðrum førum skal atkvøðuseðilin vera útfyltur í fyrsta lagi 1 viku áðrenn valdagin.*" Hetta merkir, at veljarar, sum lúka hesar treytir, kunnu greiða brævatkvøðu til kommunuval frá 12. juli 2024 at rokna.

Løgmálaráðið hevur í mai mánað í ár biðið kommunurnar upplýsa fyri sær, hvussu nógv brævatkvøðutilfar kommunurnar liggja inni við. Við grundarlagi í hesum upplýsingum fer Løgmálaráðið at senda brævatkvøðutilfar til kommunurnar í næstum. Kommunur, sum tørva brævatkvøðutilfar, verða bidnar um at boða Løgmálaráðnum frá hesum á telduposti lmr@lmr.fo.

Í sambandi við kommunuvalið er ætlanin at skipa fyri kunnandi fundi í september fyri valnevndar- og valstýrisformonnum og annars starvsfólkum hjá kommununum, sum hava við kommunuval at gera. Kunnað verður nærri um fundin í august.

Viðheft verður sent vegleiðandi yvirlit yvir freistir í sambandi við kommunuvalið 2024.

Vegna Løgmálaráðið

Elinborg Apol
fulltrúi

Gongin 7 • Postrúm 377 • FO-110 Tórshavn
☏ (+298) 35 80 80 • lmr@lmr.fo • www.lmr.fo